# Leys størv á Fróðskaparsetri Føroya

**Hesi størv eru leys at søkja á Fróðskaparsetri Føroya við teirri fyritreyt, at játtan Setursins loyvir tað. Samanleggingartilgongdin og nýggja skipan Setursins eru enn ikki loknar, og tað er ein av orsøkunum til, at nøkur starv eru lýst sum parttíðar- og tíðaravmarkað størv. Viðvíkjandi teimum tíðaravmarkaðu størvunum kann valið av linjulestri á Læraraskúlanum vera avgerandi fyri um tey verða sett ella ikki.**

**Eitt adjunkt- ella lektarastarv**
***í føroyskum sum móðurmáli***
Starvið er granskingar- og undirvísingarstarv. Setanarøkið er Fróðskaparsetrið í síni heild og tann, sum sett/ur verður, skal undirvísa bachelorlesandi og masterlesandi í føroyskum, læraralesandi í móðurmálsundirvísing og fólkaskúlalærarum undir eftirútbúgving. Undirvísingin fevnir um bæði málfrøði og móðurmálsdidaktikk.*
Granskingarparturin verður knýttur at granskingarøkinum hjá tí sum sett/ur verður. Hann skal fevna bæði um málfrøði í víðari merking og móðurmálsdidaktikk í breiðum høpi og tann, ið sett/ur verður, skal annars átaka sær uppgávur á Fróðskaparsetrinum í síni heild, har tørvur er á tí, og kunna tola broytingar í starvsviðurskiftum sínum. Starvið verður sett frá 1. august 2011.

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarar skulu í minsta lagi hava kandidat- ella masterútbúgving í føroyskum og móðurmálsdidaktiskan førleika á hægri stigi ella vilja til at uppstiga seg á hesum øki.

*Undirvísingin í føroyskum fyri lærarar og námsfrøðingar fevnir m.a. undirvísing í stavseting, málburði, orðafeingi, málfjølbroytni, barna- og ungdómsbókmentum og -máli, mentan, og siðsøgu í lærara- og pedagogútbúgvingunum. Haraftrat rættlesing av skrivligum verkevni og vegleiðing í sambandi við skrivlig avrik hjá teimum lesandi, umframt eftirmeting og vegleiðing í sambandi við B.Ed-verkætlanir.

**Eitt adjunkt- ella lektarastarv í *kristni,***
***siðalæru og lívsáskoðan***
Starvið er granskingar- og undirvísingarstarv. Setanarøkið er Fróðskaparsetrið í síni heild og tann, sum sett/ur verður, skal í fyrsta umfari serliga undirvísa í kristni í linjulestri fyri læraralesandi og fólkaskúlalærarum og teimum, ið taka linjulestur í kristni sum eftirútbúgving og í lívsáskoðan og siðalæru í lærarautbúgvingini, pedagogútbúgvingini og annars eisini undirvísa í øðrum høpi á Fróðskaparsetrinum.

Granskingarparturin verður knýttur at granskingarøkinum hjá tí, sum sett/ur verður, skal eisini fevna um fakdidaktikk í breiðum høpi og tann, ið sett/ur verður, skal annars átaka sær uppgávur á Setrinum í síni heild har tørvur er á tí og skal kunna tola broytingar í starvsviðurskiftum sínum. Starvið verður sett frá 1. august 2011.

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarar skulu í minsta lagi hava kandidat- ella masterútbúgving í teologi/kristni ella samsvarandi útbúgving.

**Eitt námslektarastarv í**
***námsfrøði og almennum didaktikki***
Setanarøkið er Fróðskaparsetrið í síni heild og tann, sum sett/ur verður, skal m.a. serliga undirvísa lærara- og pedagoglesandi í námsfrøði og almennum didaktikki og í eftirútbúgving av lærarum og pedagogum og annars undirvísa á Fróðskaparsetrinum í síni heild, har tørvur er á tí, og skal kunna tola broytingar í starvsviðurskiftum sínum. Starvið verður sett frá 1. august 2011.

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarar skulu í minsta lagi hava kandidat- ella masterútbúgving í námsfrøði ella samsvarandi útbúgving.

**Eitt námslektarastarv í *skúlabúgving / innskúling***
Setanarøkið er Fróðskaparsetrið í síni heild og tann sum sett/ur verður, skal m.a. serliga undirvísa lærara- og pedagoglesandi og lærarum og pedagogum í eftirútbúgving í linjulestrinum í skúlabúgving / innskúling og annars undirvísa á Fróðskaparsetrinum í síni heild, har tørvur er á tí, og skal kunna tola broytingar í arbeiðsviðurskiftum sínum. Starvið verður sett 1. august 2011.

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarar skulu hava starvsroyndir á økinum og í minsta lagi kandidat- ella masterútbúgving á námsfrøðiliga økinum.

**Eitt námslektarastarv innan *sernámsfrøðiliga økið***
Setanarøkið er Fróðskaparsetrið í síni heild og tann, sum sett/ur verður, skal m.a. serliga undirvísa pedagoglesandi í lærugreinini serøkið á grund og vera ein av fleiri undirvísarum í linjulestrinum sernámsfrøði, sum er fyri læraralesandi, pedagoglesandi og lærarar og pedagogar í eftirútbúgving og annars undirvísa og átaka sær uppgávur á Setrinum í síni heild, har tørvur er á tí og skal kunna tola broytingar í arbeiðsviðurskiftum sínum. Starvið verður sett 1. august 2011.

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarar skulu hava starvsroyndir á økinum og í minsta lagi kandidat- ella masterútbúgving á sernámsfrøðiliga økinum.

**Eitt tíðaravmarkað parttíðarstarv (60%) sum**
***námslektari í námsfrøðiligari leiðslu***
Setanarøkið er Fróðskaparsetrið í síni heild og tann, sum sett/ur verður, skal m.a. serliga undirvísa lærara- og pedagoglesandi og lærarum og pedagogum í eftirútbúgving í nýggju linjulærugreinini námsfrøðilig leiðsla. Starvið verður sett 1. juli 2011 og gongur út 30. juni 2012

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarar skulu í minsta lagi hava kandidat- ella masterútbúgving innan økið og starvs- og leiðsluroyndir innan námsfrøðiliga økið.

**Eitt tíðaravmarkað partíðarstarv (60%) sum**
***námslektari í enskum***
Tann, sum sett/ur verður, skal undirvísa læraralesandi og lærarum undir eftirútbúgving í linjulærugreinini í enskum. Starvið verður sett 1. august 2011 og gongur út 30. juni 2012.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu í minsta lagi hava kandidat- ella masterútbúgving í enskum ella samsvarandi útbúgving.

**Eitt tíðaravmarkað parttíðarstarv (60%) sum**
***námslektari í lívfrøði***
Tann, sum sett/ur verður, skal undirvísa læraralesandi, pedagoglesandi og lærarum og pedagogum í eftirútbúgving í lívfrøði. Starvið verður sett 1. august 2011 og gongur út 30. juni 2012.

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarar skulu í minsta lagi hava kandidat- ella masterútbúgving í lívfrøði ella samsvarandi útbúgving.

**Almenn førleikakrøv til øll størvini:**
Víst til Reglugerð fyri størv á Fróðskaparsetri Føroya, har minstakravið til lærarar og granskarar á Fróðskaparsetrinum er kandidatprógv ella masterprógv sambært Bologna-avtaluni, umframt tey krøv sum sambært reglugerðini eru fyri størv á Fróðskaparsetrinium Tað er umráðandi, at viðkomandi sýnir hug og vilja til framhaldandi menning eisini sum granskari. Umsøkjarar, sum hava royndir við undirvísing og vegleiðing, og tey, sum hava granskingarroyndir, hava fyrimun tá øll størvini skulu setast

**Umsóknarfreist og umsóknir**
Umsóknarfreistin til øll størvini er 10. mai 2011.

Við umsóknini skulu leggjast avrit av próvskjølum, CV og lýsing arbeiðsroyndum, granskingarprofili og framtíðarætlanum umsøkjarans við starvinum. Eisini skal fylgja við yvirlit yvir øll vísindalig avrik umsøkjarans. Upp til 10 tey bestu vísindaligu avrikini skulu leggjast við umsóknini í fýra eintøkum serliga um talan er um føst størv. Størvini verða sett við støði í Reglugerð fyri størv á Fróðskaparsetri Føroya. Løn og starvstreytir eru sambært sáttmála millum landsstýrið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsókn skal sendast til:**
*FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA*
*Setursskrivstovan*
*J. C. Svabos gøta 14*
*Postrúm 272*
*110 Tórshavn*
*tlf. 35 25 00*
*www.setur.fo*

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til rektaran á Fróðskaparsetri Føroya, Jóan Paula Joensen jopajo@setur.fo og rektaran á Læraraskúlanum, Jóannes Hansen joannes@flsk.fo.

Upplýsingar um virksemið á Fróðskaparsetrinum eru at finna á heimasíðuni: www.setur.fo.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA · SETURSSKRIVSTOVAN · TLF. 35 25 00 · J. C. SVABOS GØTA 14 · POSTRÚM 272 · 110 TÓRSHAVN · WWW.SETUR.FO